# Frítíðarundirvísingin á Oyrarbakka

## veturin 2001/2002

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Motiónsfimleikur menn** | Mánadag<br>Fríggjadag | 21.00–22.18<br>21.00–22.18 | Erling Petersen | 423194 |
| **Ættargransking** | Mánadag | 19.00–22.30 | Hansina Olsen | 441056 |
| **Tónleikur** | Mikudag<br>Hósdag<br>Týsdag | 10.35–14.05<br>14.15–17.50<br>09.40–11.20 | Óli Jákup Joensen | 443389 |
| **Postalínsmáling** | Týsdag | 19.00–22.30 | Eydna Johansen | 422335 |
| **Handarbeiði** | Týsdag | 18.45–22.15 | Katrin Hansen | 423491 |
| **Guitarspæl** | Hósdag | 19.30–21.10 | Árni Joensen | 422305 |
| **Seyming** | Mikudag | 18.45–22.15 | Jóhanna Heinesen | 422633 |

### FRÍTÍÐARVIRKSEMI

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Svimjing 3.–5. fl.** | Hósdag | 17.00–17.45 | Thordis Hansen | 422158 |
| **Svimjing 6. fl. og uppeftir** | Hósdag | 17.45–18.30 | Thordis Hansen | 422158 |

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning frá myndugleikunum. Luttøkugjaldið er 300 kr. fyri hvørja lærugrein, tó 500 kr. fyri motiónsfimleik, og tað skal verða flutt á konto skúlans nr. 6460-1001908 í Føroya Banka beinanvegin, tá ið undirvísingin er byrjað. Skúlanæmingar gjalda 30 kr. Fráboðan og nærri upplýsingar hjá faklærara.

**Felagsskúlin á Oyrarbakka**
**Tlf. 422084**

## Kunngerð um forboð móti flutningi av livandi kleyvdýrum oyggjanna millum v.m.

Við heimild í §§ 9, 13-14 og § 48 stk. 2 í løgtingslóg nr. 16 frá 23 februar 2001 um djórasjúkur (um fyribyrging og niðurberjing av sjúkum hjá djórum og um marknaeftirlit við djórum og djóraúrdráttum) verður ásett:

**§ 1.** Forboð er fyri flutningi av livandi neytum, seyði, geitum og svínum úr øllum oyggjum í Føroyum.

*Stk. 2.* Undantikið ásetingunum í stk. 1, er flutningur av seyði úr óbygdum oyggjum, hólmum og stakkum til slátururs í plássum, har nevndu støð hoyra til.

**§ 2.** Eftir umsókn kann Landsdjóralæknin geva undantaksloyvi frá ásetingunum í § 1, stk. 1, um so er, at flutningurin ikki førir við sær munandi vanda fyri sjúkuspjaðing.

*Stk. 2.* Landsdjóralæknin kann geva undantaksloyvi til flutning av kleyvdýrum millum oyggjar til sláturs á góðkendum sláturvirki.

*Stk. 3.* Umsókn um loyvi til flutning av livandi kleyvdýrum skal geva hesar upplýsingar:

1) Navn, bústað og telefonnummar sendarans,
2) navn ella nummar á dýrahaldi ella hagaparti, har dýrið verður flutt frá,
3) hvat slag av dýri talan er um, ættarslag (rasu), aldur og kyn, oyramerki ella id-nummar,
4) navn, bústað og telefonnummar móttakarans,
5) navn ella nummar á dýrahaldi ella hagaparti, sum dýrið verður flutt til, ella upplýsingar um, hvar ætlanin er at slátra dýrið, og
6) váttan sendarans um, at tað hvørki í upprunadýrahaldinum ella hagapartinum, haðani dýrið kemur, hava verið tekin um sjúku í bólki A ella B sbr. fylgiskjal 1 & 2 í lógini, seinastu 6 mánaðarnar, ella um ridluskriða seinastu 3 árini.

**§ 3.** Ikki er loyvt at flyta kleyvdýr, sum hava sjúkutekin, ella at flyta kleyvdýr frá dýrahaldi við smittandi sjúku.

*Stk. 2.* Landsdjóralæknin kann geva undantaksloyvi frá forboðnum í stk. 1.

**§ 4.** Ikki er loyvt at flyta seyð úr hagaparti, har klinisk tekin um ridluskriða (scrapie) hjá seyði er staðfest seinastu 3 árini.

*Stk. 2.* Landsdjóralæknin kann geva undantaksloyvi frá forboðnum í stk. 1, um flutt verður beinleiðis til góðkent sláturvirki.

**§ 5.** Brot á § 1, stk. 1, § 3, stk. 1, § 4, stk. 1 verður revsað við bót.

*Stk. 2.* Fyri brot, sum verða framd av løgfrøðiligum persóni, sum t.d. partafelag ella lutafelag, kann tann løgfrøðiligi persónurin verða sektaður sum slíkur.

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*Stk. 2.* Samstundis fer kunngerð nr. 121 frá 24. august 2001 um flutning av kleyvdýrum v.m. úr gildi.

Vinnumálsstýrið 27. september 2001

**Jørgen Niclasen, (sign.)**
landsstýrismaður fyri

**Bjarna Djurholm,**
landsstýrismann

/Arne Poulsen (sign.)

VIT ERU FLUTTIR Í NÝGGJ HØLI!

**Nú húsast vit í Reynstúni 19 á Argjum**




**Fokus Elektronik**
Boks 2119,165 Argir
Tel 311306, Fax 311306

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

## Dansiskeið á Glyvrum

Skeið í enskum dansi verður í fimleikarhøllini í Glyvra skúla 12.-13. okt.

Anna Kirstin av Tvøroyri undirvísir.

**Nes Sóknar Musikkfelag**

## Eydnuhjól við Gjógv

Gjáar Samkomuhús skipar sunnudagin fyri eydnuhjóli við Gjógv til frama fyri bygdarhúsið. Lýst verður nærri í útvarpinum.

**Gjáar Samkomuhús**

*Uppsetan og skipan av barrum*

*Til:*
*Brúdleyp*
*Rundar føðingardagar*
*Starvsfólkaveitslur*
*Ársveitslur*
*Reseptiónir*
*og tilíkt*



*Hans á Lag Sp/f*
*Tlf. 21 93 83*
*hanslag@post.olivant.fo*
*Sosialurin 311820*



Við Sosialinum
Í BÝIN

Sosialurin fer í býin hvørja viku og tú sleppur at fylgja við hvussu hetta spælir av

Les í býin hvønn hósdag !



HESA VIKUNA

**Fríggjakvøldið**
ladies night — DJ Eyðfinn Drewsen

**Leygarkvøldið**
DJ Eyðfinn Drewsen

FÓTBÓLTUR Á STÓRSKÍGGJA

Café'in hevur opið mán.–frí. 17.00–24.00 og leyg.–sun. 14.00–24.00
**Club 20 Café**
**Írskur búffur**
v/chips, salat & whiskeysós
EISINI TANN BESTI Í LANDINUM
**69,–**

Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

## Rentubroyting

Við virknaði frá 1. oktober 2001, lækkar Føroya Sparikassi rentustigini á inn- og útláni. Rentubroytingin er eitt úrslit av, at rentustøðið í Danmark er lækkað fyri kortum.

Eftir hækkingina verða høvuðsrentustigini hesi:

| **Innlán** | **% p.a.** |
|---|---|
| Vanlig konto: | 0,100 |
| 3. mðr. uppsøgn: | |
| - saldo 0 - 100.000 | 3,000 |
| - saldo 100.000 - 300.000 | 3,500 |
| - saldo 300.000 - 1.000.000 | 3,750 |
| - saldo yvir 1.000.000 | 4,000 |
| Ábyrgdarakonto: | |
| - saldo 0 - 100.000 | 3,250 |
| - saldo 100.000 - 300.000 | 3,750 |
| - saldo 300.000 - 1.000.000 | 3,875 |
| - saldo yvir 1.000.000 | 4,125 |
| 12. mðr. uppsøgn: | |
| - saldo 0 - 100.000 | 3,125 |
| - saldo 100.000 - 300.000 | 3,675 |
| - saldo 300.000 - 1.000.000 | 3,875 |
| - saldo yvir 1.000.000 | 4,125 |
| Bassakonto: | 4,000 |
| PlussKort konto: | 2,500 |
| PlussSpar konto: | 3,500 + 0,5 |
| Bústaðarkonto: (íroknað 3,0% í rentustudningi) | 7,000 |
| Luta- og kapitaleftirløn: | 4,500 |

| **Útlán** | |
|---|---|
| Sethús 1. veðrættur | 5,25 - 5,50% p.a. |
| 2. veðrættur | 8,00 - 8,75% p.a. |
| Billán: | |
| Alt eftir útgjaldi og trygd | 5,75 - 7,75% p.a. |

Postboks 34
FO-110 Tórshavn
Tlf. 348000, Fax. 348400
FØROYA SPARIKASSI

Restorffs SISU

FLOG-FRAKT



SAFARI TRANSPORT
www.safari.fo
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tel. 32 22 22
Sosialurin - 311820

## Fáa tit ikki blaðið leygardagar?

Vinarliga ring tel. 214118, um tú sum haldari ikki fært leygardagssosialin. Boðar tú ikki frá innan kl. 15.00 leygardag, hava vit ikki møguleika fyri at bera leygardagsblaðið út.

Vit sóknast eftir...

**Einum bilmekanikara / smiði & einum lastbilmekanikara / smiði**

- Tú hevur útbúgving ella royndir sum eru tengd av starvinum
- Tú hevur samstarvsevni, og er áhugað/ur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi
- Tú er álítandi og tekur fegin við avbjóðingum, og vil fegin arbeiða á nútímans verkstaði
- Vit eru ein bilsøla við mekaniskum verkstaði, sum lýkur øll nútímans krøv
- Hjá okkum starvast 24 fólk, og vit umboða fýra bilmerki: Citroén, Mercedes-Benz, Mitsubishi og Chrysler
- Vit bjóða eitt spennandi starv, í góðum arbeiðsumhvørvi og við øllum nútímans hentleikum

Er tú tann vit sóknast eftir - ivast ikki, send skrivliga umsókn við møguligum prógvum og viðmælum til Ivan Johansen Bilar, allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði

CITROËN DaimlerChrysler MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo